Hósdagur 1. februar

SVF

18.00 Tá feittið skal burtur – um venjingar og motión
18.30 Jumanji 1:38
19.00 Urið hjá Bernardi 1:6
19.15 Basalt (e)
20.00 Dagur og Víka við Grannum okkara
20.50 Hotellið 8 – donsk rød
21.35 Roomservice – seinasta sending
22.15 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2 – ensk rød
23.05 DR-Dokumentar: Søgur av einari politistød
00.05 Liðugt

EURO SPORT

07:30 Alpine skiing
08:30 Snowboard
09:00 Alpine skiing
09:30 Live alpine skiing
10:30 Car racing
11:00 Live alpine skiing
12:00 Snowboard
13:00 Live tennis
16:30 Alpine skiing
17:20 News
17:30 Olympic games
18:00 Xtreme sports
18:30 Trial
19:30 Football
21:30 Alpine skiing
22:00 News
22:15 Tennis
23:15 Alpine skiing
00:15 News
00:30 Close

BBC PRIME

00.00 TLZ: »Horizon – Bones of Contention«
01.00 TLZ: »Science at War – Hydrogen Bomb«
02.00 TLZ: »What Have the `60s Ever Done For Us? – Sounds«
02.10 TLZ: »Background Brief: Superbugs On the March – Talks«
02.25 TLZ: »Science Bites: Winner Don't Think – Bites«
02.30 TLZ: »Life on a Thread«
03.00 TLZ: »Galapagos - Research in the Field«
03.30 TLZ: »Sex and the Single Gene?«
04.00 TLZ: »Buongiorno Italia – Rivediamo un Po'«
04.30 TLZ: »Zig Zag – France – The Alps«
04.50 TLZ: »Back to the Floor – Pillow Talk«
05.30 TLZ: »Look ahead«
06.00 Bodger and Badger
06.15 Playdays
06.35 Run the Risk
07.00 The Really Wild Show
07.30 Ready, Steady, Cook
08.00 Style Challenge: »Rival Landlords«
08.25 Change That
08.50 Going for a Song
09.30 Top of the Pops Plus
10.00 Antiques Roadshow
10.30 TLZ: »Horizon – Einstein – the Miracle Year«
11.30 Looking Good
12.00 Ready, Steady, Cook
12.30 Style Challenge: »Driving School«
13.00 Doctors: »God's Will«
13.30 EastEnders
14.00 Real Rooms
14.25 Going for a Song
15.00 Bodger and Badger
15.15 Playdays
15.35 Run the Risk
16.00 The Really Wild Show
16.30 Top of the Pops Global
17.00 Home Front
17.30 Doctors: »Confidential Information«
18.00 EastEnders
18.30 Castaway 2000
19.30 2point4 Children: »And Now the Screaming Starts«
20.00 Casualty: »Starting Over«
21.00 How do you want Me?: »Ready, Steady, Kill«
21.30 Top of the Pops Global
22.00 Silent Witness: »Brothers in Arms«
23.30 Dr Who: »Time-Flight«

BBC WORLD

00.00 News – Weather
00.30 HARDtalk
01.00 News – Weather
01.30 Holiday Special – India
02.00 News – Weather
02.30 Reporters
03.00 News – Weather
03.30 Asia Today.
03.45 World Business Report.
04.00 News – Weather
04.30 HARDtalk
05.00 News – Weather
05.30 Waterworld
06.00 News – Weather
06.30 Reporters
07.00 News – Weather
07.30 HARDtalk
08.00 News – Weather
08.30 Simpson's World
09.00 News – Weather
09.30 HARDtalk
10.00 News – Weather
10.30 Holiday Special – India
11.00 News – Weather
11.30 Simpson's World
12.00 News – Weather
12.30 HARDtalk
13.00 News
13.15 World Business Report – Weather
13.30 Waterworld
14.00 News – Weather
14.30 Simpson's World
15.00 News – Weather
15.30 Asia Today.
16.00 News – Weather
16.30 HARDtalk
17.00 News
17.15 World Business Report – Weather
17.30 Talking Movies
18.00 News – Weather
18.30 World Business Report
18.45 World Sport
19.00 News – Weather
19.30 HARDtalk
20.00 News – Weather
20.30 Click Online
21.00 News – Weather
21.30 World Business Report
22.00 News – Weather
22.30 Panorama
23.00 News – Weather
23.30 World Business Report
23.45 Asia Today

3 VIASAT

05:30 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:35 Garfield og venner
09:00 Alias Smith & Jones
10:00 Træneren
10:30 Horton-sagaen (G)
11:20 Horton-sagaen
12:10 Melrose Place - classic
13:05 Vild med dig
13:30 Panter-tanter
14:00 Mig og fremtiden
14:55 Baywatch
15:45 Min kære familie
16:10 Ricki Lake
17:10 Dagens Nyheder på TV3
17:30 Med på moden
18:00 Alle tiders barnepige
18:30 Baren
19:00 Torsdagsbio: Karate Kid 3
21:10 Heksene fra Warren Manor
22:05 Action
22:35 Baren (G)
23:05 Dagens Nyheder på TV3
23:15 Ti tommelfingre
23:45 Strømer i L.A.
00:15 Nash Bridges
01:10 Kojak
02:10 Drøm videre
02:40 Simpsons
03:05 Ricki Lake (G)
04:05 Godnat

ÚTVARP FØROYA

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Sunneva Kallsberg í Kvívík lesur
07.15 Barnaløtan Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Morgunrásin
09.50 Morgunlestur (e) Sunneva Kallsberg í Kvívík lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fyrrapartsløg Kim Hansen stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Hjá dvørgum í Níðafjøllum (e) Hans Tórgarð lesur 1. part av framhaldssøgu eftir Annfinni í Skála
11.30 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Í grannalagnum (e)
13.30 Tónleikur
14.00 Kjaktorgið (e)
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin Sending við tónleiki og prátí um sjómansliv. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Vangamynd Annlis Bjarkhamar og Jóhannes Miðskarð leggja til rættis
17.00 Tíðindini
17.05 Í Vingarðinum Alexander Samuelsen leggur til rættis
18.05 Barnaløtan (e) Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
19.00 Hetjur í Skriftini Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Harmonikutónar Flóvin Jacobsen skipar fyri
20.30 Á sanganna veingjum Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur Ginna Midjord skipar fyri
22.00 Rák Anita Ottosen stílar fyri
23.00 Tíðindi

Rás 2 FM 102 FM 107

10:45 Orðið Bibliulestur v/ Anju Hansen
11:00 Birgir Beinleiðis Birgir Sondum við gesti
12:00 Tíðindi & Lýsingar
13:00 Leysaløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi og lýsingar
15:15 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Laila Beinleiðis Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
17:00 Barnarásin (e)
18:00 Tíðindi og lýsingar
18:15 Lættur tónleikur
19:00 Orð á leiðini "Jesus og stress" 3 (3) EVR-sending Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og lýsingar
21:15 Orðið (e) Bibliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo

Lindin FM 91.9

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Lindin 1 ára føðingardagur, brot úr sendingum frá farna árinum
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
18.05 The Finishing Touch ensk sending við tónleiki og prátí. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 The Finishing Touch heldur fram
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð
20.55 Dagsins Orð
21.00 Bønarlinjan við gesti. Bønarevnu kunnu ringjast inn frá 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 Vertur tykkara hesarferð: Jenis av Rana.
Vit gevast uml. middnátt

Jumanji 1:38

Teknirød, ið byggir á filmin við sama navni. Um nøkur fólk, ið spæla eitt spæl, sum endar við, at tey enda inni í spælinum, og fyri at koma út úr aftur spælinum, skulu tey loysa nakrar uppgávur og tað kann verða sera spennandi...

Teir fyrstu partarnir av røðini Jumanji vórðu sendir í Fimlu fyri tveimum árum síðani. Teir fara vit nú at senda aftur og síðani kemur framhaldið av røðini.

Á sanganna veingjum

Hóskvøldið kl. 20.30

Hesaferð hoyra vit Berghild Poulsen syngja, og vit hoyra einræddaðan sang úr Útvarpshøllini. Ljómur úr Vági og Havnarkórið fara at syngaj nakrar sálmar.

Gunnvør Poulsen stílar fyri

Karate Kid 3

– Amerikanskt actiondrama frá 1989



Leikstjórin av Rocky, John G. Avildsen, kemur her við sínum triðja Karate Kid filmi, og karatedrongurin verður enn einaferð spældur av tí 31 ára gamla Ralph Macchio, sum enn líkist einum tanáringi.

Karatedrongurin Daniel La Russo hevur nú sín egna handil við Bonsai trøðum saman við sínum gamla lærumeistara Mr. Miyagi. Tíverri hevur bølmenni Terry Silver, sum er kemi-millióner og karatemeistari, aðrar ætlanir við Daniel.

ítróttur

Nr. 18 • fríggjadagur • 26. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Neistin-StÍF 23-29 (12-14)

Strandingar hava annan fótin inni

Hóast tað enn resta 60 minuttir av hondbólti, áðrenn teir kunnu kenna seg tryggar, so munnu strandingar kenna seg nærum vísar í finaluplássinum eftir seksmála sigurin á Neistanum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir at vit nú í nakrar vikur, hava havt høvi at síggja hondbólt á einum fyri okkum óvanliga høgum støði, er gerandisdagurin nú aftur komin hjá teimum hondbóltsáhugaðu.

Landsliðini, sum hesar vikurnar hava trampað runt á hallargólvinum vóru mikukvøldið skift út við mansliðini hjá Neistanum og StÍF, sum skuldu avgreiða fyrru hálvfinaluna sínámillum. Annars vóru tað somu lið, sum í fjør hittust í hálvfinaluni, men meðan Neistin vann tað ferðina, so tykist tað nú sum um strandingar eru væl ávegis at fáa sína hevnd.

StÍF meira breidd í

Tað kann verða sagt beinan vegin, at sigurin hjá StÍF var uppiborin. Ikki tí at munurin á liðnum var so øgiliga stórur, men strandingar høvdu lítla pettið meira at geva enn heimaliðið. Tað lítla pettið, sum so ofta vísir seg at gera av, hvønn veg dysturin skal koppa.

Tað sást kanska ikki so nógv til hesar lítlu munir fyrstu løtuna, men tað skuldi gerast alt meira greitt, at talan var um munir. Eitt nú tykist breiddin í álopsspælinum hjá strandingum at vera væl størri, enn hon er hjá neistaliðnum. Kanska løgið, tá Neistin hevur ein av allarbestu miðspælarunum í landinum, men hinvegin tykist ikki, sum um Jacobn longur megnar at stýra so nógv, sum hann hevur evnini til.

Fyrsta stóra partin av dystinum varð íslendingurin ofta tikin út á beinkin, serliga í verjupartinum, og varð hetta allarhelst gjørt fyri at minka um orkunýtslluna. Í hansara stað royndu neistavenjararnir seg í nøkrum førum við Áka Mørk, men fyri tað mesta við nýggja dananum á liðnum, Rune Møller.

Um hendan seinasta er annars at siga, at tað væl kann vísa seg at vera góður fongur hjá Neistanum, at hava fingið hann á liðið. Hóast hetta var fyrsti veruligi dystur hansara við felagnum, so sýndi hann onkrar góðar taktir í spæli sínum. Hann tykist hava hug at stýra viðleikarum, hevði onkra væl sædda fríspæling, og skotstyrkin tykist eisini vera í lagi. Hinvegin merkti manglandi innspælingin á liðnum, at samanhangurin í spælinum onkuntíð hvarv – bæði í álops- og verjupartinum.

Mál av veinginum

Strandingar hava aftur í ár flestu av væl kendu andlitunum á liðnum, men serliga tóktust tað vera tveir leikarar, sum skaraðu framúr í dystinum mikukvøldið.

Marius Joensen gav fleiri ferðir royndir um, hví hann er vorðin ein av føstu lutunum á manslandsliðnum.

At John Petersen valdi at spæla hondbólt aftur hendan veturin hevur serliga roynst strandingum væl í verjupartinum
Mynd: Álvur Haraldsen

Ferð var á spæli hansara, og bæði í álops- verjupartinum royndist hann sera drúgvur.

Eisini má tað metast sum sera góður fongur hjá strandingunum, at John Petersen valdi at taka innanduraskógvarnar fram aftur hendan veturin. Í verjuspælinum er hann liðnum ein sera hollur stuðul, og gevur hann har umframt eisini Arturi tíð at hvíla seg millum álopsroyndirnar. Í álopspartinum varð hann ikki eins nógv nýttur, men tá hann fær møguleikan liggur hansara partur so avgjørt ikki eftir, og so dugur hann nakað, sum fáir aðrir føroyskir leikarar megna. Hóast høgrahandaður so fær hann skorað av høgra veingi, og skal metast eftir landsliðnum, er hetta í øllum førum ein saknur í føroyskum manshondbólti.

Høvdu tamarhald á

Um dystin sjálvan er annars at siga, at tað vóru strandingar, sum vóru frammanfyri allan dystin á tamb. Munurin millum liðini var tó ikki hin stóri undan steðginum, men eftir at gestirnir togaðu seg fýra mál fram um beint eftir steðgin, tóktust teir hava tamarhald á støðuni.

Neistin royndi fleiri ferðir eftir hetta at taka leiðslluna aftur, men tað tóktist hvørja ferð, sum um takið kostaði ov nógvar kreftir, og so rykti StÍF aftur. Vónin hjá Neistanum fyri einum møguleika í seinna dystinum mundi tó tendra nakað, tá teir seint í dystinum minkaðu niður í trý, men enn eina ferð gjørdu strandingar bart. Trý mál á rað tryggjaðu seks mála sigurin, og tískil kundu strandingarnir fara av vøllinum við vissu um, at teir hava allar trumfirnar á hondini, tá returdystirnir skulu spælast komandi týsdag.

At Artur og teir nú hava annan fótin í finaluni er lítið at ivast í
Mynd: Álvur Haraldsen

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Neistin: Ári Rouch 5(3), Rune Møller Jensen 4, Jacob Jónsson 4, Áki Mørk 4, Kári Mortensen 3(1), Ræni Slættanes 1, Ragnar Zachariassen 1, Jákup Sverri Kass 1(1)
StÍF: Artur Johansen 6(4), Marius Joensen 6, John Petersen 4, Kristian Petursson 2, Bent Djurhuus 2, Costin Dumitrescu 2, Andre Danielsen 1
Brotskøst: Neistin 6, StÍF 4
Útvísingar: Neistin 1, StÍF 1
Dómarar úr H71/Kyndli: Petur S. Dahl og Gunnar Gregoriusen. So avgjørt ikki teirri besti dagur, og feildómirnir vóru fleiri í tali. Alt hetta fall tó báðar vegir, so avgerandi fyri dystin vóru teir á ongan hátt, og ivaleyst verður avrikið betri næstu ferð.